# TILTØK

**Gudstænastur**
**21. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Sonja Klein, altarg., – skriftamál kl. 10.40.
***Nólsoy:*** kl. 12.00, Sverri Steinhólm
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Bergur D. Joensen. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini
***Kirkjubøur:*** kl. 12.30: Bergur D. Joensen. ***Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini.***
***Vestmanna:*** kl. 11.00, altarg., Marjun Bæk. ***Í Kollafjarðar kirkju gongur talvan fyri Bláa Kross Føroyar***
***Tjørnuvík:*** kl. 12.00, altarg., Mogens Tilsted Christensen
***Hósvík:*** kl 12.00, altarg., Inga Poulsen Dam
***Skála:*** kl. 11.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Glyvrar:*** kl. 11.00, Meinhard Bjartalíð (útv.)
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, altarg., Martin R. Jacobsen (Talvan gongur fyri sunnudagsblaðið).
***Sørvágur:*** kl. 11.00 altarg., David Johannesen
***Hvalba:*** kl. 18.00, Ólavur Rasmussen
***Fámjin:*** kl. 12.00, altarg., Jónsvein Bech

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jens Wang um evnið »Eyðkenni úr lívi hins trúgvandi – fyrigevandi«. Kl. 11.30 er samvera við drekka. Kl. 12.00 á tilbiðjanarmøtinum talar Jógvan Z. um Rombrævið – tí Gud gav tey upp«.
Sunnudagsskúli kl. 12.00. Barnaansing undir møtinum.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.
Bøn kl. 17.30.
Heimaforbundið skipar fyri møtinum sunnudag kl. 18.00 Hjørdir Petersen talar. Drekkamuður aftaná møti. Øll eru vælkomin.
www.frelsunarherurin.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti, Annika Berg talar.
Mánakvøldið kl. 20.00 »Vit koma saman« samvera og orð Guds við Elin og Hans Tausen, evnið hesuferð: Lívið við Kristusi«.
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. www.gospel.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølinum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 15. okt. kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Fríkirkjan Oasan**
Í kvøld kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Senøva og Dánjali av Rana.
Fríggjakvøldið kl. 23.00 Bønarnátt. Bønarevnir kunnu ringjast ella sms'ast á tlf. 597597.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/ Martin Olsen. Sunnudagsskúli og barnakórið hava heystfrí.
Mánadagin kl. 20.00 Bønmøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Frá Ebenezer**
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
www.ebenezer.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Á møtinum talar Øssur Berghamar. Eingin Sunnudagsskúli verður vegna heystfrí.
Mánadagin 17. oktober kl. 19.00 verður Betwix, ið er eitt tiltak fyri ung sum ganga í 5.-8. flokki. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Símun Joensen, Glyvrakórið syngur.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn fyri samkomuni, kl. 19.00 Chil.
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Alex O'Campo – ABC v/ Fríðtór Debes – evni: Hvat sigur Bíblian um at fasta, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangel. møti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti við Jónhildu og Gulak Hansen úr Tjørnuvík, Thomas Juul Askham úr Havn, Jógvan Lamhauge úr Skopun o.ø.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Petur Zachariassen talar.

**Miðvágslegan**
Bygdalegan verður í Nesvík í døgunum 18.-20. november.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Hóskvøldið kl. 19.00 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ David Bech.
Kvøldbíbliuskúlin byrjar 19. okt. Høvi er at tekna seg til henda á tlf. 770073.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Dánjal av Rana.
Sunnudagin kl. 17.00 Familjumøti. Nátturði aftaná (øll taka við).
www.keldan.fo

**Elim, Søldarfjørður**
Sunnudagin kl. 12.00 Breyðbróting. Eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Á møtinum kl. 18.00 verður luttøka úr Kaldbak. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hæddin í Runavík**
Opið hús verður leygarkvøldið kl. 20.00 ymiskt á skránni.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangel. møti við sangi, vitnisburðum og talu, har Tórmund og fleiri luttaka og Herman og Gigga syngja.

**Getsemane, Klaksvík**
Ungdómsmøtir vera í skúlanum á Fossánesi fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.30 við André Matras og Andreas Nýggjagarð.
Leygardagin kl. 16.00 er barnamøti í skúlanum á Fossánesi.
Sunnudagin kl.14.00 sunnudagsskúli og kl.18.00 er møti.
Mánadag til fríggjadag kl. 6.15 er morgunbøn.
Tú ert hjartaliga vælkomin!

**KFUM og KFUK í Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbiltími við Regin Høgnesen, 1. Kor. kap. 7.
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta, kl. 20.00 venur gospelkórið »Gleðið«.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti – Ísraelstoymi greiður frá túri í Ísrael. Kl. 21.00 Ungdómsmøti við Ísraelstóymi hjá Heimamissiónini. Øll eru vælkomin.
www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti – Libanon systrarnar luttaka.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18.00 Møti. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin er eingin sunnudagsskúli vegna heystfrí. Kl. 17.30 Bønarmøti og kl. 18 Møti við Jónsvein Bech.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Møti verður sunnudagin kl. 18.00. Talarar Ásbjørg og Árni Kjærbeck.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Tórsdagin kl. 17.00 Barnamøti, kl. 20.00 Á ferð í bíbliuni v/ Magnus Jensen.
Fríggjadagin kl. 17.00 Barnamøti.
Leygardagin kl. 17.00 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 17.00 Familjumøti v/ Magnus Jensen, øll eru vælkomin.

Mánadagin kl. 20.00 Guitarskúli 12 ár og eldri.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. fundur – Ólavur Jacobsen talar á báðum møtunum.
Mánadagin kl. 20.00 Bøn.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Kirstein og Noru Stórhamar.

**Ørkin, Reykjavík**
2.-7. nov. fær Örkin vitjan av Jógvani Fríðrikssyni, presti o.ø. Í hesum sambandi verður møti, hugnakvøld og gudstænasta.
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.hotel-orkin.com

**Evangeliskir fundir í Danmark**
Fríggjakvøldið 14. okt. kl. 19.30 verður evangel. fundur í Sædding Center, Sædding, Esbjerg.
Leygarkvøldið kl. 19.00 Evangel. fundur í skolehjemmet Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið kl. 17.00 Evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle.
Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjóða vit ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyingafelagið í Århus**
Sunnudagsskúlin byrjar aftur í Árstovu sunnudagin kl. 15.00. Á skránni verður barnasangur, bíbliusøga og spæl. Vit enda sum vant við einum drekkamunni. Øll eru vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 10. oktober***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45 Enskt á byrjanarstigi
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, telving, bobbspæl, landastrok, dart og onnur spøl.
***Møguleiki er at koma sum gestur. Tilm. til døgurðan miku- og fríggjadg. tlf. 316491***
***Týsdagin 11. oktober***
kl. 10.00-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00 Eldraráð og eldraval. Katrin D. Jacobsen, forkvinna í sosialu nevnd
***Mikudagin 12. oktober***
kl. 10.00-13.30 Matgerð, Anne Grete Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 10.00-17.00 Handarbeiði, Dominobinding, binding á knagum o.a.
***Hósdagin 13. oktober***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45 Enskt á byrjanarstigi, Ásmundur Johannesen (Bókasavnið á 1. hædd)
kl. 14.00-17.00 Telduprát, Brandur Petersen

kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 14. oktober***
kl. 10.00-13.30 Matgerð – Anne Grete Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 10.00-12.00 Tekning og máling (havi tilfari við). Vegleiðing er á staðnum.
kl. 14.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 16. oktober verður gongutúrur frá Vesturvarða í Havn til Suðurvarða. Farið verður av Kunningarstovuni **kl. 10.30.** Túrurin er lættur. Gingið verður uml. 3 tímar, minst til at hava góð og heit gonguklæðir og ein matpakka við. Tilmelding neyðug.

**Tilhaldin Hugnin í Sandoynni**
Er opið mánadag og mikudag kl. 14.00 til 17.00. Drekkamunur er at fáa báðar dagarnar eins og bløðini eru til taks. Øll eru vælkomin.
***Mánadagin 10. oktober og mikudagin 12. oktober er tilhaldið stongt.***

**Tilhaldið á Toftum**
tlf. 448690
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 14.00-18.00
***Mánadagin 10. oktober***
Opið hús
***Týsdagin 11. oktober***
Tekningarlisti til telduskeið liggur frammi. Vit byrja skeiðið 18. oktober v/ Derdrei Hansen
***Mikudagin 12. oktober***
kl. 15.00-16.00 Vit syngja v/ Martin Restorff Jacobsen. Øll eru vælkomin við hugskotum.
***Hósdagin 13. oktober***
Vit spæla kort, telva, kalah og onnur spøl
***Fríggjadagin 14. oktober***
Hondarbeiði og hondverk

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
***Mánadagin 10. oktober***
Fimleikur
***Týsdagin 11. oktober***
Prát og sangur. Vit spæla landastrok.
***Mikudagin 12. oktober***
Boccia

***Hósdagin 13. oktober***
Myndaskering
***Fríggjadagin 14. oktober***
Byrjandi enskt v/ Annette Gaardlykke.
***Eftir heystfrítíðina verður matgerð fyrrapart mikudag í Fløvanum. Matgerðin er undir kvøldskúlaskipanini. Møguleiki verður eisini at koma til døgurða hendan dagin sum gestur. Kostnaður. Tekning á tlf. 448051 ella 266217.***

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Dagtilhaldið í Luffistovu, Fuglafjørður**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.
***Týsdag***
Kort og onnur spøl.
***Mikudag***
Ymisk ítriv.
***Hósdag***
Fimleikur
***Hvønn dag drekka við nýbakaðum.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Vegna serligar umstøður**
verður brúdleypið, ið verða skuldi 29. oktober, hjá Rúnu Skouboe og Hjarnari Dalsgaard, útsett.

**Brúdleyp**
Leygardagin 15. oktober kl. 16.00 giftast í Sandavágs kirkju Rúna Marna Olsen, Sørvágur og Tony Lindal Davidsen, Sandavágur. Veitslan verður hildin í høllini á Giljanesi kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 333373, 333173 ella 508887.

**75 ár**
Leygardagin 15. oktober fyllir Páll Jacobsen, á Nesi, Vágur 75 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá hann, eru vælkomin millum kl. 14.00 og 14.00.